

-Kosturin hjá teimum eldru er ómetaliga týdningarmikil fyri teirra heilsu. Missa tey eldru døgurðatilboðið er stórur vandi fyri, at tey missa motivatiónina at eta, og tá er skjótt, at tey tapa seg. heldur kostráðgevin, Ulla Sissel Brandi

Mynd: Bárður Lydersen

Døgurðatilboð dettur burtur:

# Tey eldru tapa seg

**Kostráðgevin á Landssjúkrahúsinum, Ulla Sissel Brandi, sigur, at úrslitið kann verða, at eldru fara at tapa seg, um døgurðatilboðið frá Lágargarði dettur burtur**

**Góð ráð til eldri fólk, ið hava lítlan matarlyst, og sum tapa seg.**

1) Etið lítið av breyði og havragrýni
2) Etið lítið av frukt og grønmeti
3) Etið eplir, rís ella pasta í minni nøgdum
4) Etið ofta fisk ella fiskaviðskeri (helst av ymiskum slagi)
5) Vel mjólkap og ost við høgum feitt prosenti
6) Vel kjøt og viðskera við høgum feitt prosenti
7) Nýtið nógv smør, margarin ella olju
8) Nýtið endliga sukur
9) Etið altíð vitamin- ella mineraltablett aftur við matinum. (Helst við einum eyka D-vitamin ískoyti)

SPARINGAR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

- Tá tú einaferð hevur tapt teg, verður tað ómetaliga torført er at fáa vektina uppaftur.

Ulla Sissel Brandi er kostráðgevi á Landssjúkrahúsinum, og hon ber ótta fyri, at fyrsta avleiðingin av vantandi døgurðatilboðnum hjá teimum eldru verður, at tey gomlu fara at tapa seg.

- Kosturin hjá teimum eldru er ómetaliga týdningarmikil fyri teirra heilsu. Missa tey eldru døgurðatilboðið er stórur vandi fyri, at tey missa motivatiónina at eta, og tá er skjótt, at tey tapa seg. heldur kostráðgevin.

Hon leggur afturat, at fáa tey eldru ikki neyðuga kostin, viknar teirra heilsustøða skjótari, enn hon vildi, um tey fingu neyðuga kostin.

### Skeiv raðfesting

Ulla Sissel Brandi heldur tað er ein margháttlig raðfesting hjá landsstýrinum, um vantandi játtanin til umsorganararbeiðið hevur við sær, at døgurðatilboðið hjá teimum gomlu dettur burtur.

- Tað bítur seg sjálvt í halan. Fáa tey eldru ikki neyðuga kostin gerast tey skjótt verri fyri, og hetta hevur við sær at teimum tørvar meira røkt. Meira røkt krevur fleiri pengar, og tískil spara myndugleikarnir einki við at skerja játtanina, vísir Ulla Sissel Brandi á.

Sum ketta úr høvdatrogi:

# Undir alt lágmark

**Leiðarin á Lágargarði, Marjun Smith, finst hvassliga at framferðarháttinum hjá myndugleikunum í samband við sparingarnar, ið eru álagdar Lágargarði**

SPARINGAR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

- Framferðarhátturin hjá myndugleikunum er átaluverdur og undir allan kritikk. Tey kundu spart okkum fyri alt hetta rokið, nú hann eftir øllum at døma ætlar at finna eina loysn í málinum.

Leiðarin á Lágargarði, Marjun Smith, er rættliga ørg inn á myndugleikarnar. Í fjølmiðlunum mikudagin boðaði landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, frá, at hann hevur í hyggju at loysa trupulleikan við vantandi játtanini til umsorganarbeiðið.

Við Sosialin segði Hans Pauli Strøm, at hann kundi ikki góðtaka, at eitt nú dagtilboðið og døgurðaútkoyring til pensjonistarnar fellur burtur, og at hann væntandi hevði eina loysn á málinum í dag, hósdagin.

### Sjey uppsøgd

Tað vóru alt annað enn gleðisboð, sjey starvsfólk á Lágargarði fingu í gjár frá leiðsluni á stovninum. Leiðslan á Lágargarði hevur boðað frá, at komandi mikudag gevst røktarheimið við mattænastuni, og letur eisini aftur dagstovnin, har tey eldru millum annað hava fingið fysio- og ergoterapi-viðgerð.

Tískil er ikki longur brúk fyri starvsfólkunum í køkinum, dagstovninum og venjingartilboðnum, ið eru knýtt at dagstovninum.

Júst fyri okkara evstamarki var framvegis ikki greitt, hvørja loysn landsstýrismaðurin hevði funnið í málinum. Tað er kortini nakað, ið bendir á, at Hans Paula Strøm finnur neyðuga peningin, so skerjingarnar hjá Lágargarði fella burtur.

Spurd, um uppsagnirnar verða tiknar aftur, um landsstýrismaðurin finnur neyðuga peningin svarar Marjun Smith:

- Ja tað verða tær sjálvandi. Hesi fólkini hava altíð gjørt sítt allarbesta, og tí vóni eg inniliga, at hesi fólkini vilja halda fram, tí tað kunnu vit ikki vita við vissu, eftir alt rokið, tey hava verið ígjøgnum seinastu dagarnar.

Leiðslan á Lágargarði hevur nú sett seg í samband við løgfrøðing, ið skal tryggja, at tað formliga er í lagi í samband við uppsagnirnar.

### Kreppa

Leiðarin á Lágargarði fortelur, at tungu boðini um uppsagnirnar veruliga hava sett síni spor á stovnin. Hýrurin er alt annað enn góður millum starvsfólkibæði tey, ið rakt av uppsagnunum og restin.

- Sjálvsagt eru vit øll eru ógvuliga hørm um støðuna, sum er íkomin. Talan er um veruliga kreppu millum starvsfólki, og vit umhugsa í løtuni at veita teimum kreppuhjálp, sigur Marjun Smith, leiðari á Lágargarði.

# - Tey gomlu eru skelkað

**Fyrrapartin hósdagin fór Petra Persson sum vant út við døgurða til teir 150 pensionistarnar í Havn, sum trúfast hava fingið sín dagliga døgurða frá Lágargarði. Hon dylur ikki fyri, at tey gomlu vóru ógvuliga skelkað, nú boð eru komin um, at frá mikudegnum verður ongin døgurði koyrdur út longur**

SPARINGAR
*Terji Nielsen*

Sjálv er Petra eitt av teimum arbeiðsfólkunum á Lágargarði, sum eru søgd úr starvi, og tað stóð henni frítt, um hon vildi koyra døgurðan út hósdagin, ella um hon vildi sleppa undan. Petra sjálv ivaðist tó ikki, tí hon vildi ikki lata ein avloysara fara út til tey gomlu, nú støðan er so ring.

### Tár í eygunum

Petra Persson sigur, at tey gomlu eru ógvuliga skelkað av tíðindunum um døgurðatænastuna, sum nú heldur uppat og taka ímóti henni við táurm í eygunum.

- Tey gomlu eru skelkað, og tey spyrja hví so er. Eg kann ikki siga, hvussu tað ber til, tí tað er ikki mítt borð. Eg má viðganga, at tað kennist ógvuliga svárt, tí fleiri eru av teimum gomlu, sum ongan avvarðandi hava, ið kann koma við døgurða til teirra. Spurningurin er so, hvussu nú verður við teimum, sigur Petra Persson.

Hon sigur, at fleiri av teimum gomlu hava lítla og onga kontakt við onnur fólk enn heimahjálpina og tann, sum kemur við døgurða til teirra.

- Tað er eisini ein trygd fyri tey avvarðandi, at tey eldru fáa døgurða koyrdan út. Tørvurin á hesi tænastuni er øgiliga stórur. 150 pensionistar fáa døgurða umvegis hesa tænastuni, men tað kundi verið væl fleiri, tí bíðilistin er langur. Tíverri hava vit ikki møguleika fyri at lata fleiri enn 150 døgurðar út av húsinum, sigur Petra Persson.

Sjálv sigur Petra, at hon bæði vónar og væntar, at tað verður funnin ein loysn upp á trupulleikan, men hon heldur, at tað ongantíð skuldi verið komið so mikið langt, at tey gomlu fáa boð um, at tænastan við at koyra døgurða út heldur uppat.



*Petra Persson var hósdagin sum vant úti við døgurða til 150 pensionistar í høvuðsstaðnum, men mikudagin fer hetta í søguna.*

Mynd: Bárður Lydersen